# arett aftaná suppuna



- Hetta er ein keðilig støða, sum vit eru komnir í. Vit vilja so fegnir fiska, men sleppa tað ikki, sigur 44 ára gamli skiparin, Victor Butrimov

*Tatyana, hon bíðar eftir mær. Eg hopi, at eg skjótt sleppi heim, - ella til fiskiskap. Annað tað. At liggja bundin við bryggju, er einki lív*

aða kjøtinum.

Hann vildi vita, um tann fremmandi hevði tikið sigarettirnar við umborð.

- Nei, sigur Victor. Eg havi biðið um tær. Men tær eru so ikki komnar enn. Og tað er so í øllum førum ikki hasin tíðindamaðurin, sum skal taka tær við umborð!

## Svangur??

Tað var ein søgan um russaran, sum helt vakt umborð á einum báti við skipasmiðjuna á Skála. Sagt varð, at hann hevði ongan mat umborð, og at hann tí varð noyddur at fiska oljudálkaðar skrubbur til lívsins uppihald.

Tað vísti seg tó - og sum lýst varð her í blaðnum - at hann hevði nóg mikið av øllum umborð. Hann leið so onga neyð. Og tað gera teir 20 menninir umborð á "Kapitan Butrimov" heldur ikki.

- Ert tú ikki svangur? Klokkan er enn bara 15 minuttir yvir 12. Vit eta um 45 minuttir. Tú ert vælkomin at eta við okkum. Kokkurin er góður, skal eg siga tær.

Skiparin tekur meg við sær inn í kabússuna. Kokkurin kemur úr messuni. Hann er í ferð við at leggja seinastu hondina á dagsins rætt - suppu, á øðrum sinni í dag - og tryggjar sær nú, at borðini eru rein, nú skaffast skal hvørja løtu.

- Kokkurin dugir sera væl at gera suppu. Vit fáa eina nýggju suppu hvønn einasta dag í viku. Hann ger góða suppu á morgni, góða suppu á middegi og góða suppu aftur á kvøldi. Einki er sum góð suppa við kjøti afturvið, sigur sigur skiparin og gevur kokkinum eitt ordiligt herðaklapp.

Nú teir liggja við bryggju sleppur kokkurin eitt sindur lættari: Undir fiskiskapi verður borðreitt fýra ferðir um dagin við góðum mati. Nú teir liggja við bryggju, og menn bert gera tað mest neyðturviliga, verður bara borðreitt tríggjar ferðir.

- Høvdu vit nú bara fingið sigarettirnar. Tað hevði verið gott omaná suppuna, sigur kokkurin.

Men tað kann tykjast langligt, tá ein liggur við bryggju enn ein dag, og eisini skal liggja næsta dagin.

- Nei, hetta er ikki serliga stuttligt. Høvdu vit bara havt hetta vælsignaða fiskiloyvið. Okkum dámar nógv betri at fiska, enn at liggja við bryggju. TAÐ er lívið!, greiðir Victor íðin frá.

*Nei, hetta er ikki serliga stuttligt. Høvdu vit bara havt hetta vælsignaða fiskiloyvið. Okkum dámar nógv betri at fiska, enn at liggja við bryggju. TAÐ er lívið!*

Tann stóri og ósvaraði spurningurin er, nær teir aftur sleppa til tað, teir í november mánaði í fjør løgdu út til: At fylla lastina sum skjótast og selja hana fyri ein góðan prís.

Og síðani sleppa heim aftur til síni kæru.

## Ongar sigarettir

Victor Makarov og hansara 19 mans eru í stóran mun klárir at fara til fiskiskap. Líka so skjótt sum teir fáa fiskiloyvið, og restin av manninginí er komin umborð, verður lagt til brots aftur í føroyskum sjógvi.

Tað er tað teir mest av øllum leingjast eftir, men okkurt skulu teir kortini takast við, nú teir liggja við bryggju. Teir fyrstu dagarnir gjørdu teir reint umborð eftir at hava fiskað í nakað meiri enn ein mánað.

Tað var kortini skjótt at hetta fekk ein enda. Okkurt smávegis var at taka til, men so við og við varð bert tað allarmest neyðuga gjørt.

- Í dag gera vit alt fyri at tryggja skipið. Og tú skilir, at tað tekur ikki langa tíð hjá 20 monnum at gera tað. Vit hava jú ligið her so leingi, slær hann brosandi fast.

Teir nýta ein stóran part av tíðini til at práta, hugna sær saman við sjónvarpi og hava eisini gingið túrar inn til Klaksvíkar ella norðureftir móti byrgingini um Haraldssund.

Ein maður kemur við ferð inn á skiparakamarið.

- Hetta er bátsmaðurin, greiðir skiparin frá, - sami maður sum vildi vera blíður við tann fremmanda og bjóða honum burtur av kók-



- Vit fortjena væl, tá vit eru til fiskiskap. Men at liggja við bryggju, gevur ongar pengar, sigur Victor Butrimov